# Miðvikan

Framhald frá síðu 15



Manningin á Queen Victoria vanlukkutúrin

**Manningin á Queen Victoria vanlukkutúrin**

**Fremsta rað f.v.**
*Andreas Johannesen, Miðvágur.*
*Sámal Jacobsen, Miðvágur.*
*Kjartan Jacobsen, Vestmanna.*
*Gunnar Haldansen, 2. motor-passari, Vestmanna.*
*Viggo Zachariassen, Streymnes.*

**2. rað**
*Hjalmar Johannesen, Miðvágur. Petur Johannesen, Miðvágur. Sofus Hansen, kokkur, Slættanes. Tummas Zachariassen, 2. bestimaður, Streymnes.*
*Abraham Jacobsen, skipari, Vestmanna.*
*Jógvan Johannesen, Vestmanna.*

**3. rað**
*Martin Eliassen, Slættanes*
*Michael Mikkelsen, 1. bestimaður, Mykines.*
*Jógvan Durhuus, motorpassari, Vestmanna.*
*John Johannesen, Vestmanna.*
*Jóan David Joensen, Sørvágur.*
*Johannes Jacobsen, Vestmanna.*
*Eivind Durhuus, Vestmanna.*

*Herlon Jacobsen úr Sandavági er ikki við á myndini.*

Umborð var hendan línan gjørd føst í erva í stórmastrina, og ein bjargingarstólur varð riggaður til. Men tá ið tann fyrsti maðurin skuldi verða stjóraður í land, vísti tað seg, at teir ikki kundu brúka stólin. Maðurin var undir í sjógv alla tíðina. Hann slapp sær tí úr stólinum og lesti seg inn eftir línuni inn á land. Soleiðis bjargaðu



*John fekk deyðamein, tá ið hann bjargaði sínum skipsfeløgum, og hann doyði tvey ár seinni. Her er hansara grøv í kirkjugarðinum í Vestmanna. Niðast á gravsteininum stendur »Harrin er hirði mín.«*

teir sær allir inn á land, ein og ein í senn. Í byrjanini var tungt at halda við hjá teimum trimum, tí línan var ofta undir. John á Bakkanum stóð niðastur undir miðju í sjógvi og tók ímóti monnunum, so hvørt teir komu inn á land.

Tá ið pápin skuldi av skipinum og handa seg inn eftir línuni, misti hann takið, av tí at hendurnar vóru beinfrystar av at hava staðið uppi í vantinum alla náttina og gøllhildið sær. Tað sama var galdandi fyri hinar báðar, ið høvdu staðið í vantinum. (Hvørjir teir vóru, er ikki greitt). Tá gjørdi John tað bragd at svimja út gjøgnum brotini eftir honum og bjargaði honum inn á land. Tað sama gjørdi hann við hinar báðar, ið høvdu hingið í vantinum, og sum vóru í somu støðu sum pápin. Tann síðsti, ið fór av skipinum, var skiparin.

Tá ið tríggir tímar vóru gingnir, vóru allir 19 mennirnir bjargaðir sum eitt satt Guds undur. Tá var klokkan umleið 9 á morgni.

## So at leita upp hús

Har stóðu allir vátir, kaldir og svangir. Fleiri vórðu ikki væl fyri aftaná eina langa, strævna og óhugnaliga nátt. Enn var nógv baks fyri framman. Teir fóru at leita upp hús, væl vitandi, at framvið strondini í Meðallandsbuktini vóru bjargingarhús "neyðarskýli" fyri skipbrotnar sjómenn at koma sær inn í. Teir tóku avgerð um at lata bátin liggja eftir á sandinum. Teir drógu hann niðanfrá, so at hann stóð fríur av flóðini. Tá ið teir høvdu gingið einar tríggjar fjórðingar eftir sandstrondini, gjørdist lagið betur, tí tá sóu teir ein stóran bygning. Men sum teir nærkaðust húsinum, síggja teir, at ein djúpur breiður ósi er at fara um. Teir vóru tí noyddir at venda aftur eftir bátinum. Men fyri at vinna tíð og fáa skjótari boð frá sær, meðan hinir mennirnir fóru aftur eftir bátinum, gjørdi John á Bakkanum aftur tað bragd, at hann svam yvir um ósan, sum var 2-300 metur breiður, við Kjartani á bakinum.

Teir báðir gingu so yvir til húsið, sum var eitt handilshús (goymsluhús), sum Keypsfelagið hjá Skaftfellingum átti við Skaftarósa. Húsið var stongt, men teir løgdu til merkis, at eitt vindeyga á aðru hædd stóð uppá glopp. Við at Kjartan traðkaði uppá akslarnar á John, náddi hann at fáa latið vindeygað upp, so at teir sluppu inn. Í húsinum var kókiútgerð og matur sum sviskur, rosinur og sagogryn, ið teir gjørdu súpan av. Har var eisini telefon, so teir fingu givið boð frá sær til bóndan á Kirkjubæjaklaustri, sum kom á staðið. Kirkjubæjarklaustur er eitt bygdarlag, ið liggur einar 25 km niðan frá strondini.

Hinir 17 menninir, millum hesar pápin, sum vendu aftur eftir bátinum, fingu eitt gott stríð. Tá ið teir komu til bátin, var hann sokkin langt niður í sandin. Teir máttu tí grava hann leysan við berum hondum. Sjálvt um fitt av kava lá á sandinum, sóu teir nakað av rekatrøum, sum teir nýttu til lunnar at draga bátin eftir. Komnir til ósan, róðu teir tvørtur um. Teir máttu ansað væl eftir, tí tað var sera nógvur áarstreymur í ósanum. Teir skiltu ikki, at John hevði klára at svomið yvirum við einum manni á bakinum. Tá ið teir komu til húsið, var klokkan umleið 14. Tann heita súpanin kom væl við, og ernaðust teir nakað. Nakað seinni kom hreppstjórin og ein bóndi, sum eisini var altingsmaður, og onnur fólk við rossum og bilum at hjálpa. Hreppstjórin sendi boð eftir økislæknanum, tí hann var bangin fyri umfarsjúku, helst spanska sjúka, sum gekk í Føroyum.

## Væl móttiknir

Læknin tók ta avgerð, at øll manningin vegna sóttverja skuldi setast í karantenu í tveimum húsum í tríggjar dagar. Annað húsið var hjá bóndanum í Kirkjubæjarklaustri, og hitt var heimið hjá bóndanum í Hólmi. Pápin kom í heimið hjá bóndanum í Kirkjubæjarklaustri. Teir vóru sera væl móttiknir, fingu heitt og gott at eta, heitt bað og turr klæðir. Klæðini, sum teir komu í, vaskaði og turkaði bóndakonan. Pápin segði, at tá ið hann kom úr baðikarinum, lá alt hárið í tottum í baðikarinum. Hetta kom helst av, at hárbotnurin hevði verið frystur av at standa hattleysur alla náttina í rigninginum. Eingin maður tyktist at hava fingið álvarsligt mein av hendingini, og komu teir hampuliga skjótt fyri seg.

Eftir fýra døgum fóru teir til Álftaver, har teir lógu nátt. Haðani hildu teir ferðina fram til Mýrdalsvíkar, har ætlanin var, at bátur skuldi flyta teir til Reykjavíkar. Men í Vík var so nógv brim, at eingin bátur fekk lagt at har. Teir máttu tí gista har í tveir dagar. Meðan teir bíðaðu, var skipað fyri fótbóltsdysti í Vík millum tað føroysku manningina og menn frá Vík. Íslendingar tóku sær sera væl av okkum, sigur pápin. Av tí, at veðrið ikki batnaði, var farið til Reykjavíkar við bili, har koyrandi va. Har eingin vegur var, ferðaðust teir á hestbaki og við sledu. Við tað at nógvur kavi var niðurkomin, var hetta ein drúgvur túrur, og máttu teir gista í tveimum støðum ávegis til Reykjavíkar. Teir blivu tí ov seinir til "Dronning Alexandrinu", sum hevði bíðað eftir teimum. Teir sluppu ístaðin heim við "Botnia", sum lá klár at sigla, tá ið teir komu til Reykjavíkar.

Teir komu heim í øllum góðum. Stutt eftir heimkomuna fekk øll manningin hvør sína bíbliu frá reiðaranum.

## John fekk deyðamein

Nakað eftir hetta gjørdist John á Bakkanum sjúkur og var innlagdur á Hospitalið. Jógvan Arge sigur frá pápabeiggja sínum Meinhard,